# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Tim Cahill hjá Everton javnaði til 1-1 bara tríggjar minuttir fyri leiklok*
*Mynd: Polfoto/ AP*

# Liverpool snávaði

**Steven Gerrard tóktist hava vissað Liverpool sigurin og oddasessin, men bara tríggjar minuttir fyri leiklok javnaði Tim Cahill í stóru grannauppgerðini við Merseyside**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eydnaðist ikki Liverpool at ota seg fram um Manchester United í ensku Premier League í gjárkvøldið.

Liverpool spældi grannauppgerð móti Everton, og eini grannauppgerð so líkt, so stríddist báðir partar til tað seinasta.

Steven Gerrard hevur verið fyri nógvum atfinningum seinastu tíðina, men hann hevur fingið álit frá leiðsluni og venjaranum, og eftir 68 minuttum kvittaði hann fyri hetta við einum vøkrum langskoti.

Liverpool - og serliga Fernando Torres - høvdu undan hesum havt møguleika at leggja teir reyðu framum. Og sami Torres hevði eisini alla orsøk at vera ónøgdur, tá hann helt seg hava brotsspark, sum ikki varð dømt.

Leingi var tó líkt til, at leiðslumálið hjá Gerrard var nóg mikið til at tryggja tey trý stigini, men Everton og Tim Cahill vildu tað tó øðrvísi. Australiumaðurin er ikki millum størstu menn á einum fótbóltsvølli, men spælið við høvdinum er framúr. Og tá eingin í Liverpool-brotsteiginum tóktist ansa honum við deyðbóltsstøðu, kundi hann stúta Everton upp á javnt.

Tað bar við sær, at Liverpool ikki fekk otað seg framum arvafíggindarnar úr Manchester United.

Teir báðir oddafiskarnir svimja nú lið um lið við 47 stigum hvør. Manchester United hevur tó eitt vet betri málmun, og ikki minst hava teir spælt ein dyst færri.

# Norðurlond eru øll víðari

**HM-endaspælið hevur higartil verið ein norðurlendsk sólskinssøga**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Øll okkara grannalond í eystri, Noreg, Danmark og Svøríki hava vunnið seg í millumspælið í HM kappingini í Kroatia. Í bólki D vann Noreg ein tryggan 30-20 sigur á Egyptalandi. Noreg var á odda 14-10 í hálvleikinum. Veteranurin, Steinar Ege stóð ein branddyst í málinum, og Kristian Kjelling skeyt 9 mál fyri Noreg.

Í sama bólki tóku danir sær av løttum ímóti Saudi Arabia. Danir vunnu stórsigur 32-13, aftaná hálvleiksstøðuna 17-4. Anders Eggert gjørdist danskur toppskjútti við 10 málum. Brasilia skelkaði øll við at sigra 32-30 á Serbia.

Tað var tó Svøríki sum stóð fyri bragdinum í bólki D, tá teir vunnu ein flottan 34-30 sigur á Spania. Svøríki førdi 19-13 í hálvleikinum. Dalibor Doder gjørdist svenskur toppskjútti við 11 málum. Johan Sjöstrand í málinum bjargaði eisini Svøríki við nógvum bjargingum.

**Úrslitini :**

**Bólkur A :**
Frakland-Australia 42-11
Ungarn-Slovakia 24-24
Rumenia-Argentina 30-26

**Bólkur B :**
Kroatia-Kuba 41-20
Svøríki-Spania 34-30
Suðurkorea-Kuwait 34-19

**Bólkur C :**
Russland-Tunesia 36-31
Týskland-Algeria 32-20
Pólland-Makedonia 29-30

**Bólkur D :**
Brasilia-Serbia 32-30
Danmark-Saudi Arabia 32-13
Noreg-Egyptaland 30-20´

Støðurnar

**Bólkur A**
Frakland 6 stig
Slovakia 5
Ungarn 5
Rumenia 2
Argentina 0
Australia 0

**Bólkur B**
Kroatia 6 Stig
Svøríki 6
Spania 4
Suðurkorea 2
Kuwait 0
Kuba 0

**Bólkur C**
Týskland 5 Stig
Makedonia 4
Pólland 4
Russland 3
Tunesia 2
Algeria 0

**Bólkur D**
Noreg 6
Danmark 6 Stig
Serbia 2
Egyptaland 2
Brasilia 2
Saudi Arabia 0

## 16 spælarar á landsliðið í morgin

**Bara spælarar úr føroysku landskappingini vera á hondbóltslandsliðnum, sum í annaðkvøld fer at spæla ímóti Grønlandi**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

16 spælarar eru í bruttuhópinum, sum Dia Midjord og Kári Nielsen, hava úttikið til landsdystin ímóti Grønlandi, sum verður spældur í annaðkvøld.

Talan er bara um spælarar, sum umboða feløg í fremstu røð í føroysku kappingini.

Spælararnir eru: Sámal Joensen, Agnar Joensen og Áki G. Olsen úr VÍF.

Hans Áki Dal-Christiansen, Janus Einar Sørensen, Høgni Klein, Josef Abrahamsen og

Lars Black, sum er málverji, úr Kyndli.

Tróndur Kragesteen, Finnur Hansson, Karl Herup Olsen og Áki Mørk úr Neistanum, Janus Sørensen, Regin Joensen, Esbern Patursson og

Levi Nybo, sum er málverji, úr H71.

## Kappingin verður styttri

**FSF hevur gjørt av, at landskappingin í 2009 endar um mánaðarskiftið september/oktober**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Dagur og Vika boðaði fríggjakvøldið frá, at fótbóltskappingin hjá monnum í ár verður stytt við einum mánað. Formuladeildin í 2009 endar um mánaðarskiftið september/oktober.

Ringt veður hevur seinastu tvey árini skapt ólag í kappingarskipanini, og í eini roynd at bøta um trupulleikan, hevur FSF valt hesa loysnina.

Liðini, sum ikki skulu royna seg í altjóða fótbólti, fara framvegis í summarsteðg, sum vanligt er.